## UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael viðgongur, at álopið á Gaza var eitt mistak

**Politisku leiðararnir í Ísrael vistu ikki, at sivilfólk komu í vanda, tá eitt F16-flogfar slepti einari sterkari bumbu niður yvir eini íbúðarhús í Gaza býi gjáranáttina. Høvdu teir vitað tað, hevði álopið verið útsett, skrivar ísraelska blaðið Haaretz**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Tann sterka bumban, sum vigaði eitt tons, drap ikki bara Hamas-leiðaran Saleh Shehadah og varaleiðara hansara, men eisini trettan sivilfólk. Níggju av teimum, sum doyðu, vóru børn, og Ísrael hevur verið fyri hvøssum atfinningum síðani álopið.

Formaðurin í ísraelska tjóðartinginum, Moshe Katsav, segði fyrrapartin í gjár, at eitt óhapp hendi undir álopinum á Gaza bý, og at tann politiska leiðslan noyðist at átaka sær ábyrgdina av tí, sum hendi.

Serliga eftirlitstænastan hjá herinum og trygdartænastan Shin Bet fóru týskvøldið undir at kanna, hvat hendi, tá avgjørt varð at bumba íbúðarhúsini í Gaza býi.

Ísraelskar hernaðarkeldur søgdu við blaðið Haaretz í gjár, at tað var eitt mistak at lata eitt F16-flogfar tveita ta sterku bumbuna niður yvir íbúðarhúsini. Keldurnar vístu á, at ætlanin var bara at raka fýra av teimum, sum doyðu. Hini vóru í húsum í grannalagnum, sum eisini fóru í sor av teirri sterku bumbuni. Sambært Haaretz hevði herleiðslan vissað politikararnar um, at grannahúsini fóru bert at fáa smávegis skaða av bumbuni.

Silvan Shalom, varaforsætisráðharri sigur við Haaretz, at herurin hevði leingið fyrireikað álop á íbúðarhúsini, har Hamas-leiðarin búði, men at politiska leiðslan hevði útsett álopið fleiri ferðir, tí vandin fyri at raka sivilfólk var ov stórur.

- Eingin eigur at halda, at forsætisráðharrin, verjumálaráðharrin ella ovastin í herleiðsluni høvdu góðkent álopið, um teir vistu, at tað fór at raka sivilfólk, sigur ísraelski varaforsætisráðharrin við blaðið.



*Níggju børn doyðu í ísraelska álopinum týsnáttina. Tað yngsta, sum var tveir mánaðir, verður her borið til gravar*

Mynd: Reuters

# Russar avrætta frá hond í Kekenia

**Hvønn mánað avrættar russiski herurin nógvar kekenskar menn, sigur altjóða helsingforsnevndin fyri mannarættindi**

KEKENIA
*Árni Joensen*

Leiðarin í mannarættindanevndini, Aaron Rhodes, sigur, at seinastu tvey árini hava burturflytingar og avrættingar kravt fleiri mannalív enn tey russisku bumbuálopini. Frá álítandi keldum hevur nevndin fingið at vita, at millum 50 og 80 ungir kekenskir menn eru avrættaðir um mánaðin. Endamálið sigst vera at tynna eitt sindur út millum teir vápnaføru menninar.

Helsingforsnevndin finst eisini at Vesturheiminum, sum verður løgd undir at lata eyguni aftur fyri tí, sum hendir í Kekenia. Nevndin vísir á, at síðani tann 11. september í fjør hevur Vesturheimunrin latið dyrnar upp fyri Russlandi, so landið kann taka lut í bardaganum ímóti yvirgangi. Samstundis hava londini vestanfyri vent eygunum frá Kekenia, sigur Aaron Rhodes.

Nevndin fýlist eisini á, at russisku myndugleikarnir hava gjørt av at steingja nakrar flóttafólkalegur í Ingosjetia, har nógvir kekenar eru. Umboð fyri nevndina hava tosað við flóttafólkini, og eingin teirra segði seg hava hug at fara aftur til Kekenia, soleiðis sum viðurskiftini eru har.

Helsingforsnevndin varð skipað fyri 20 árum síðani og skuldi halda eygað við myndugleikunum í táverandi Sovjetsamveldinum og londunum í Eysturevropa. Amerikanska greinin av nevndini hevur seinni fingið navnið Human Rights Watch.

# Flogskipararnir høvdu í meira lagi

**Tveir amerikanskir flogskiparar drukku seks litrar av øli í part, áðrenn teir settu seg í eitt flogfar við 124 ferðafólkum**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*

Tann 41 ára gamli Christopher Hughes og tann 44 ára gamli Thomas Cloyd koma nú fyri rættin í Miami í Florida.

Vitni hava greitt frá, at teir báðir menninir drukku fyri meiri enn 900 krónur teir fimm tímarnar, teir sótu á einari barr í Miami. Seks tímar seinni settu teir seg í stýrihúsið á ferðamannaflogfarinum hjá American West, sum skuldi til Phoenix við 124 ferðafólkum.

Men starvsfólkini í flogfarinum kendu tann rama ølroykin frá teimum báðum flogskiparunum og boðaðu myndugleikunum í flogshavnini frá, hvussu vorðið var. Sambært løgregluni í Miami vísti blóðroyndin, at alkoholinnihaldið var tvær ferðir tað loyvda.

Teir báðir menninir kunnu fáa upp í fimm ára fonsgul.

# Regatta 2002 í Føroyum

**Aftur í ár skipar Hósvíkar Róðrarfelag fyri Regatta-sigling í Føroyum. Hesu ferð verður lagt frá landi tann 9. august, og verður fyrst siglt frá Eiði til Hósvíkar, og síðani víðari til Nólsoynna, har nólsoyingar skipa fyri Ova-stevnu**

REGATTA-SIGLING
*Ragnhild Ellingsgaard*

Regatta-siglingin, sum Hósvíkar Róðrarfelag skipar fyri, er vorðið eitt afturvendandi tiltak tey seinastu árini. Og so verður eisini hetta summarið.

Fríggjakvøldið tann 9. august verður farið av Eiði, og síðani verður siglt allan vegin til Hósvíkar. Tá komið verður til Hósvíkar, verður borðreitt við døgurða í Bygdarhúsinum, og seinni um kvøldið verður eisini skipað fyri Regatta-dansi í somu hølum.

Í Hósvík verður møguligt at seta sær eitt tjald upp, og er ætlanin, at allir luttakararnir yvirnátta har á staðnum.

Eftir eina góða nátt uttandura verður borðreitt við morgunmati tíðliga leygarmorgunin. Síðan verður aftur farið á sjógv, og siglt verður nú móti Nólsoynni. Her skipa nólsoyingar fyri Ova-stevnu, so lunnar skuldu verið lagdir undir eitt stuttligt og summarligt vikuskifti.

Stuðla tiltakinum hava Bátatænastan og Kall.

Um onkur hevur hug at verða við í Regatta 2002, so ber til at tekna seg sum luttakara á heimasíðuni www.krf.fo, ella við at ringja á telefon 210186, 221595 og 221418.

# Nordisk Litteratur 2002

**Nýggjasta útgávan av Nordisk Litteratur er komið og tekur til viðgerðar norðurlendsku bókmentirnar. M.a. er áhugaverd grein um Heðin Brú**

BÓKMENTIR
*Dagfinn Olsen*



Nordisk Litteratur 2002 er komið. Tíðarritið tekst við norðurlendskar bókmentir og allar greinir eru á skandinaviskum og enskum máli.

Í ritinum eru áhugaverdar greinir um bókmentir og bókmentafólk og annað hesum viðvíkjandi.

Jógvan Isaksen, ið er ritstjóri, hevur m.a. áhugaverda grein um Heðin Brú. Fyri stuttum vóru 100 ár síðani skaldið var borið í heim. Greinin nevnist "Det er umuligt at skrive i et lille samfund". Eisini William Heinesen er nevndur í Nordisk Litteratur 2002, ið hesaferð er 140 blaðsíður.

Nordisk Litteratur kemur í eini 30.000 eintøkum og verður sent til fleiri enn 60 lond kring allan heim.

Tað er Nordisk litteratur- og bibliotekskomite (Nordbok), ið gevut tíðarritið út.








